# Elspa til EM fyri Danmark



Danir hava gjørt av, hvussu svimjilandslið teirra sær út, tá EM í stuttum hyli verður svomið. Og millum svimjararnar, sum eru á liðnum, er eisini Elspa Mørkøre, sum nú svimur fyri Danmark. Elspa skal her svimja 50 og 100 metra rygg, skrivar svimjing.com. Eisini telur liðið Mads Glæsner og Jon Rud, sum báðir máttu lúta fyri Pál Joensen, tá DM á stuttbana varð svomið herfyri.

# Atlantic Airways heldur fram

Eisini tey bæði komandi kappingarárini eitur fremsta mansdeildin í hondbólti Atlantic Airways-kappingin. HSF og Atlantic Airways hava boðað frá, at partarnir eru samdir um treytirnar fyri nýggjum sáttmála, og at hesin verður undirskrivaður sum partur av karmunum kring landsdystin móti Serbia í kvøld. - Vit fegnast um at kunna stuðla Hondbóltssambandi Føroya í tvey ár aftrat. Hondbólturin gjørdi vart við seg á altjóða pallinum longu fyri 30 árum síðan, og vónandi stendur nú ein nýggj stórtíð fyri framman, sigur Henny á Líknargøtu, marknaðarsamskipari í Atlantic Airways.

## Maradona landsliðsvenjari

**Fyrrverandi argentinski landsliðsvenjarin, Carlos Bilardo, váttar, at Maradona tekur við starvinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Maðurin, sum var venjari, tá Argentina seinast vann HM í fótbólti í 1986, Carlos Bilardo sigur, at legendariski Diego Armando Maradona verður argentinskur landsliðsvenjari.

Carlos Bilardo skal sjálvur verða tekniskur stjóri hjá argentinska landsliðnum. Diego Maradona skal avloysa Alfio Basile, sum ikki hevur havt eydnuna við sær, sum argentinskur landsliðsvenjari.

Argentina hevur ikki havt góð úrslit í HM-undankappingini. Diego Maradona er millum best umtóktu persónarnir í Argentina, og hevur ongantíð dult, at hann hevur ynskt at gerast argentinskur landsliðsvenjari. Hinvegin eru ikki nógv, sum hava ynskt hann sum landsliðsvenjara, um metast skal eftir meiningarkanningunum, sum eru gjørdar í argentinsku miðlunum.

Maradona er í dag 48 ára gamal, og átti hann høvuðsæruna fyri, at Argentina vann HM í Meksiko í 1986. Tá var Bilardo venjari, og hann og Maradona funnu eisini saman í 1992, tá Maradona spældi við Sevilla. Eitt ævintýr, sum tó endaði, tá Maradona gjørdist frá sær sjálvum í illsinni, eftir at Bilardo skifti hann út í einum dysti, har Maradona upprunaliga ætlaði at geva avboð vegna skaða, men har venjarin partú vildi hava hann at spæla.

Men virðingin partanna millum hevur tó altíð verið til staðar, og nú er so líkt til, at tað verða teir báðir, sum skulu stýra Argentina.

# Fagnaðurin er leygardagin

**Um vikuskiftið verður stóri fimleikafagnaðurin í Norðurlandahúsinum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fimleikafagnaðurin er annað hvørt ár, og er tað her setningurin hjá feløgunum at lýsa eitt ávíst evni, sum verður ásett av Fimleikasambandinum.

Evnið í ár er »mótsetningar«, og seinastu vikurnar hava feløgini vant av øllum alvi fyri at lýsa hetta evnið. Í mun til so nógvar aðrar kappingar, so er fimleikafagnaðurin eisini eitt høvi, har feløgini fáa sýnt fram breiddina innan felagsarbeiðið. Venjingarnar hjá bæði yngstu og elstu íðkarunum hava verið nógvar seinastu vikurnar, og um vikuskiftið fæst so at síggja, hvussu úrslitið av hesum er.



*Evnið, sum hesa ferð skal lýsast á Fimleikafagnaðinum, er »mótsetningar«*

# Royn vann smádreingjadeildina

Í kappingini á hálvum vølli fyri smádreingir eydnaðist tað Royn at vinna FM. Liðið sæst á myndini, og eru hesir **standandi frá vinstru:** Trygvi Midjord venjari, Eyðun Ellendersen, Bjarni Poulsen, Jóan Hammer, Olgar Nielsen, Herálvur Thomsen, Uni Holm, Jóan Petur Johansen, Tóri Nattestad. **Húkandi eru** Kristin Oluf Müller, Allan Müller, Jónar Holm, Teitur Midjord, Janus Midjord

